# FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI

# UM

# FELAGSINS VIRKSEMI SÍÐANI

# ÁRSAÐALFUNDIN

**November 2014**

# Frágreiðing frá nevndini til eigararnar
# á eykaaðalfundinum hin 28. november 2014

SEV hevur av álvara lagt seg á grønu kósina. Elfelagið er vorðið grønari, síðani vit sóust seinast. Vindmyllulundin í Húsahaga hevur stundum saman við vatnorkuni lyft okkum væl upp um 60 prosent elframleiðslu úr varandi orkukeldum. Tað er hugaligt at vera vitni til.

Elfelagið er eisini vorðið búskaparliga sterkari hetta seinasta árið. Leiðslan væntar 54 milliónir krónur í avlopi á rakstrinum í ár, sum kann brúkast til at veita fígging til nógvu avbjóðingarnar fyri framman. Tað er eitt nú íløgur í fleiri grønar orkukeldur og til útbyggingar av oljuriknu verkunum, sum framhaldandi verða okkara tiltakstrygd í nógv ár afturat, tó at málið er 100 prosent grøn elorka í 2030.

Avbjóðingin hjá SEV er framvegis veitingarskylda og støðug streymveiting øðrumegin – og grønar útbyggingar, umhvørvisvernd og sveiggjandi oljuprísir hinumegin. Men tess grønari vit verða, tess minni er oljan ein búskaparlig hóttan ímóti SEV og harvið føroyska samfelagnum, tá ið talan er um elorku.

SEV skal áhaldandi nøkta vaksandi tørvin á elorku. Í gerandisdegnum er hendan avbjóðingin stór og spennandi, og virksemið er nógv og fjølbroytt. Talan er um avbjóðandi uppgávur, sum okkara dugnaligu starvsfólk dagliga greiða úr hondum í sínum arbeiði, sum fer fram undir virðsorðunum: Samstarv, Eldhugi og Virðing – SEV.

Elfelagið arbeiðir í samsvari við Veðurlagspolitikkin og Orkupolitikkin hjá landinum. Virksemið hjá SEV verður lýst nærri í hesi frágreiðing, har nevndin lýsir tey mál, sum nevndin metir hava størstan áhuga hjá eigarunum. Frágreiðingin verður latin sambært grein 3, stk. 13a, og grein 4, stk. 12a í viðtøkum felagsins.

## Fjølbroytt virksemi

Arbeiðið við "Heildarætlan fyri elorkuøkið í Føroyum" hevur ligið stilt eina tíð. Men nú hevur stýrisbólkurin aftur havt fund, har frágreiðingarnar hjá báðum projektbólkunum vóru viðgjørdar. Úrslitið av arbeiðinum verður væntandi almannakunngjørt innan stutta tíð.

Loyvið til nýtslu av vatnkraftini fór formliga úr gildi 5. oktober 2013. Vinnumálaráðið hevur arbeitt við at orða nýtt loyvi, og SEV hevur biðið um innlit í hetta arbeiðið. Eftir at SEV fekk innlit, var støðan viðgjørd saman við eigarunum á óformligum fundi 5. september 2014, har avrátt var, hvørja støðu SEV skal hava. Vinnumálaráðið fekk kunnandi tilfar frá eigarafundinum, og 24. september høvdu Vinnmálaráðið, Jarðfeingi, SEV og Kommunufelagið fund um viðurskiftini. SEV kom við uppskoti um, hvussu arbeiðast kann víðari á økinum, men enn hevur Vinnumálaráðið ikki vent aftur hesum viðvíkjandi. Hinvegin hava vit enn einaferð fingið fráboðan um, at vatnloyvið er longt – nú til 28. februar 2015.

SEV hevur eisini fingið innlit í fleiri mál hjá Jarðfeingi, sum hava við pumpuskipan at gera. Felagið er í holt við at orða sínar viðmerkingar til tilfarið.

Í sambandi við framleiðsluvirksemið innan vindorku hevur verið arbeitt sambært nýggju elveitingarlógini, sum kom í gildi í 2007. Í 2008 viðgjørdi umboðsnevndin spurningin, og tá var heimilað, at framleiðsluvirksemið innan vindorku varð lagt í dótturfeløg, sum SEV eigur 100 prosent.

Myndugleikarnir hava greitt úr hondum tvey vindorkuútboð - tað fyrra í Neshaga og tað seinna í Húsahaga. Í hesum sambandi hevur samstarv við onnur verið ein partur av tilgongdini. Nevndin tók tíðliga eina jaliga støðu til samstarv við onnur við tí fyritreyt, at aðalfundurin góðkennir leistin.

Vindmyllulundin í Neshaga skal ætlandi leggjast í dótturfelag, sum SEV eigur 100 prosent.

Nú vindmyllulundin í Húsahaga er liðugt bygd og ætlandi eisini skal leggjast í eitt dótturfelag, skal greiða samstundis fáast á, hvørt aðalfundurin tekur undir við, at farið verður undir samráðingar við P/F Magn. Í sambandi við at boðið var latið inn, var ætlanarskriv gjørt við P/F Magn um, at P/F Magn kann koma at eiga upp í 33 prosent av felagnum. Ein fyritreyt fyri hesum er góðkenning frá aðalfundinum og frá avvarðandi myndugleikum.

Høvuðsorsøkirnar fyri at gera ætlanarskriv við P/F Magn, og at lata hetta inn til Jarðfeingi í sambandi við boðgevingina, vóru hesar:

1) at ætlan um at hava privatan aktør sum part av boðnum var mett at geva ávísa trygd ímóti diskriminerandi viðgerð hjá myndugleikanum,
2) samstarv kundi skapa nýggjan aktør í sambandi við komandi vindorkuútboð, og
3) líknandi tilboð var givið øðrum privatum aktøri frammanundan.

Ætlanin var upprunaliga, at málini um at leggja vindmyllulundirnar í Neshaga og Húsahaga í dótturfeløg skuldu leggjast fyri aðalfundin í dag, men nevndin metti tað vera rættari, at eigararnir fyrst fáa høvi at viðgera spurningarnar um at leggja framleiðsluvirksemið innan vindorku í dótturfeløg og samstarv við onnur innan virksemið á elskipanini á einum óformligum eigarafundi. Síðani er ætlanin at viðgera og taka støðu til møgulig ítøkilig uppskot á einum seinni aðalfundi.

Á henda hátt fáa eigararnir høvi til at kunna seg nærri og spyrja um viðkomandi tilfar herundir fyriliggjandi aftursvar frá viðkomandi myndugleikum, sum verður sent út fyri eigarafundin soleiðis, at spurningarnir síðani kunnu viðgerast á nøktandi hátt.

Vísandi til hetta er boðað til óformligan eigarafund fríggjadagin 12. desember 2014, kl. $9^{30}$, har spurningarnir um at leggja framleiðsluvirksemið innan vindorku í dótturfeløg og samstarv við onnur innan virksemið á elskipanini eru til umrøðu.

Nevndin hevði fund við Sp/f Røkt 5. september 2014, har tosað var um støðuna og møguleikar fyri samstarvi í einari breiðari fatan. Fundur er avtalaður at verða aftur 12. desember 2014.

Nevndin arbeiðir víðari við uppskotinum um serfrøði í nevndina hjá SEV. Uppskotið er latið Vinnumálaráðnum og fyrrverandi Innlendismálaráðnum til viðmerkingar. Tá ið svar er komið frá myndugleikunum, er ætlanin, at uppskotið verður lagt fyri aðalfundin.

Hvat strategi viðvíkur, so arbeiðir nevndin áhaldandi við dagføring av langtíðarætlan innan útbyggingar. Eisini eru uppgávur sum dagføring av viðskiftatreytunum í gongd, og tikið er undir við arbeiðsætlan innan leiðslumenning hjá felagnum. Arbeitt verður eisini við at gera eina uttanhýsis nøgdsemiskanning um SEV. Havt verður alla tíðina í huga, at starvsfólk felagsins verða førleikament til tær avbjóðingar, framtíðin setur.

Arbeitt verður við samleikanum hjá SEV. Nevndin er av tí fatan, at felagið er ein modernað, burðardygg og nýskapandi fyritøka, og hetta ynskir SEV at kjølfesta við átøkum, sum "profilera" SEV samsvarandi.

26. august 2014 vóru nevnd og leiðsla felagsins á skeið nevnt "bestyrelseskursus" hjá Dansk Energi í Vejle, og vit vóru eisini á sera áhugaverdari vitjan hjá Energinet.dk í Fredericia. Energinet.dk er ogn hjá danska statinum, sum einsamalt eigur flutningsnetið og hevur ábyrgdina av elveitingini í Danmark.

Nevndin metir, at luttøkan á Orkustevnuni 2014 var góð. Avgjørt er, at SEV luttekur aftur í 2015. Fyribils er ásett, at stevnan verður í ítróttarhøllini á Hálsi dagarnar 20. og 21. februar í 2015.

Nevndin er nøgd við, at samskiftið við myndugleikarnar er gott. Soleiðis kann vísast á, at SEV hevur regluligar fundir við Jarðfeingi um tørvin á útbyggingum, hetta í samsvari við §11, 3.stk í Elveitingarlógini, sum ásetur at *"SEV skal í samráð við landsstýrismannin leggja til rættis og meta um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og -net."* Eisini hevur SEV havt regluligar fundir við Vinnumálaráðið, har m.a. greitt hevur verið frá roknskapinum og fíggjarætlanini hjá felagnum. Somuleiðis er nevndin sannførd um, at kunningarfundirnir á heysti við allar kommunurnar eru sera gagnligir.

## Útbyggingar innan varandi orku

Arbeiðið at seta upp 13 Enercon vindmyllur í Húsahaga í Tórshavn hevur gingið sum ætlað, soleiðis hava bæði kostnaðar- og tíðarætlan hildið. Vindmyllurnar vóru yvirtiknar fyrst í oktober mánaði, og 9. oktober 2014 var stórt hátíðarhald á Hotel Føroyum, tá ið vindmyllulundin alment var tikin í nýtslu. Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður trýsti á start-knøttin. Umleið 300 gestir luttóku, og tiltakið var eisini sjónvarpað (stroymað) beinleiðis á heimasíðuni hjá SEV.

Arbeitt verður við at fáa til vega battaríkipanina, sum skal javna framleiðsluna frá vindmyllulundini. SEV hevur bílagt tvær battaríbingjur frá fronsku fyritøkuni SAFT, og saman við Enercon eru vit í holt við at menna stýrisskipanina. Framleiðslan frá vindmyllulundini verður javnað við battaríkipanini út á elkervið.

Ætlanin er, at battaríkipanin verður tikin í nýtslu í september ella oktober í 2015. Í tí sambandinum verður arbeitt við at skipa fyri einari altjóða ráðstevnu í Føroyum um vindorku, har dentur verður lagdur á avbjóðingarnar við nógvari óstøðugari vindorku á einari elskipan, og hvat gerast kann.

Fyrr í ár mælti SEV Jarðfeingi til at fara undir eitt útbjóðingarumfar við vindorku í Suðuroy. Jarðfeingi hevur sett arbeiðið í gongd, og SEV og Jarðfeingi fara í felag at gera vindmátingar á útvaldum støðum í Suðuroy.

Tann triðja Vestas V47 vindmyllan hjá SEV í Neshaga, sum var tikin niður, verður ætlandi sett upp við Eiðisvatn. Felagið ger hetta ætlandi í samstarvi við Norðvind, sum er lokalt vindfelag heimahoyrandi á Eiði. Flestu loyvir at seta vindmylluna upp eru fingin til vega. Myllan verður eftir ætlanini sett upp komandi summar (2015).

Avgjørt er at skifta út verandi Becos-stýrisskipan við eina nýggja frá Schneider Electric. Talan er um stýrisskipan fyri rakstur av netinum og framleiðsluni. Vit vænta okkum munandi batar við hesi nýggju skipanini.

24. januar 2014 undirskrivaði SEV eitt Memorandum of Understanding við Voith um samstarv innan sjóvarfalsorku. Ætlandi skal Voith royna eina sjóvarfalsmyllu í føroyska umhvørvinum. Eisini hava vit samband við aðrar veitarar, sum somuleiðis vísa økinum kring Føroyar ans. SEV hevur søkt Jarðfeingi um loyvi at nýta part av Vestmannasundi til hesar royndirnar. Í løtuni er spurningurin til viðgerðar hjá Landsverki.

Tað kann verða sjóvarfalsorkan, sum gerst lykilin til, at vit gerast 100 prosent framleiðandi úr varandi orkukeldum, tá talan er um orkutørvinum á landi. Henda orkukelda veitir orkuna regluliga og javnt gjøgnum árið, meðan bæði vatn- og vindorkan hava tað við at fara í “summarfrí”. Vit hava dømir um eitt summar, har hvørki vatn- ella vindorkan góvu nakað munagott íkast í nærum tríggjar mánaðir. “Grøna” visiónin hjá SEV fyri ár 2030 byggir á hesi trý beinini vatn-, vind- og sjóvarfalsorku.

Á elbilaøkinum hevur felagið sett av 1 mió. kr. á fíggjarætlanini fyri 2015 at nýta til løðistøðir á nøkrum útvaldum støðum í Føroyum, sum liggja høgliga fyri. Hetta er fyrsta stig at hava eitt ávíst undirstøðukervi klárt, nú tað kanska kemur gongd á hópframleiðsluna av elbilum.

Saman við Jarðfeingi og øðrum luttekur SEV í einum arbeiðsbólki at kortleggja møguleikar fyri, hvussu umleggjast kann til elloysnir at hita upp bygningar. Ætlanin er, at tær fyrstu niðurstøðurnar hja bólkinum skulu fyriliggja miðskeiðis í 2015.

## Aðrar útbyggingar

Útbyggingin við einum nýggjum motori afturat á Vágsverkinum er sett í gongd. Ymiskt fyrireikandi er gjørt, og í løtuni verður grivið út fyri at byggibúgva økið. Stígur kom í hetta arbeiðið eina løtu, tí komið var fram á gamalt ósprongt dynamitt. Arbeiðið var lagt um, og tann parturin er avgreiddur. Hetta hevði við sær ein meirkostnað á umleið 1 mió. kr. Í nærmastu framtíð verða ymisku veitingarnar bodnar út. Áðrenn nýggi motorurin er tikin í brúk, er avmarkað við møguleikum felagsins fyri streymveiting til nýggjar kundar í Suðuroy.

Í sambandi við neyðugu víðkanina av Sundsverkinum er avtala gjørd við Sp/f Terra v/Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingi, um uppgávuna sum verkætlanarleiðari fyri í fyrsta umfari at gera hugskots- og byggiskrá. Hesin fyrsti parturin av uppgávuni er í gongd, og verkætlanarleiðarin kemur at greiða nærri frá hesum beint eftir fundin í dag.

Fyri at lúka komandi umhvørviskrøv innan handfaring av oljuúrdráttum, fer fram ein stór dagføring á Sundsverkinum av tangagarðinum við dagtangahúsið og nýggjari rørleiðing. Hetta kostar tilsamans umleið 90 mió. kr. í trý ár. Byggingin verður væntandi liðug í 2015.

Vinnulívið er í stórum vøkstri í løtuni, og fegnast vit øll um tað. Hetta setur eisini nýggj og økt krøv til SEV. Nýggja virkið hjá P/F Bakkafrost á Glyvrum, virkið hjá P/F Pelagos í Fuglafirði og hitamiðstøðin hjá P/F Fjarhitafelagnum í Tórshavn gera sítt til ein vaksandi eftirspurning eftir elmegi, sum hevur við sær munandi útbyggingar á elkervinum. Harumframt skal nýggj koplingarstøð byggjast í Vestmanna og eisini ein á víðkaða Sundsverkinum. Sostatt verður neyðugt at byggja fimm koplingarstøðir næstu trý til fimm árini. Arbeitt verður við at gera hetta til eina stóra verkætlan - heldur enn fimm "smærri" verkætlanir - fyri harvið at náa eina bíligari veiting.

## Stórur tørvur á fígging

Lániskuldin hjá felagnum við ársenda verður væntandi 753 mió. kr. Vit síggja fyri okkum, at neyðugt verður við nýggjari lánifígging á umleið 247 mió. kr. næsta ár. Støða okkara í dag er soleiðis - hvat fígging viðvíkur - at vit hava rokkið markinum fyri, hvat føroyskir lánistovnar kunnu veita okkum, tí er neyðugt at fáa stóran part av hesari fígging uttanlands í samstarvi við okkara føroysku veitarar.

Arbeiðið millum SEV og samtakið við BankNordik og Skandinaviska Enskilda Bankan at útvega okkum samlaðu fíggingina heldur fram. Roknað verður við, at komið er á mál í 2015.

Hesin spurningurin verður nærri viðgjørdur í serstakari frágreiðing frá SEV nevnd "FÍGGJARGONGDIN 2014 og RAKSTRAR-, FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN 2015", sum neyvari lýsir viðurskiftini kring fíggjarætlanina. Henda frágreiðingin er eisini til viðgerðar á fundinum í dag.

## Mett roknskaparúrslit fyri 2014

Sambært seinastu framskrivingunum verður úrslit felagsins fyri 2014 mett at liggja á einum yvirskoti á umleið 54 mió. kr. Hetta er eitt nøktandi úrslit, men tað er eisini neyðugt, eftir at SEV í fleiri ár á rað hevur havt hall, samstundis sum stórar íløgur við tilhoyrandi lántøku standa fyri framman, ið eisini krevja eina munandi eginfígging.

Oljan er framhaldandi nógv tann størsta einstaka útreiðslan hjá SEV, og roknað verður við einari nýtslu á 110 mió. kr í 2015. Hetta er ein mett minking á 20 mió. kr. sammett við 2014.

Aftur í ár hevur verið tørvur á lántøku. Í ár er samlaða økingin í skuld og kassakreditti mett til 278 mió. kr.

## Fíggjarætlanin fyri 2015

Fíggjarætlanin fyri komandi ár er løgd til rættis við einum yvirskoti á 37 mió. kr. Síðani ætlanin var gjørd, er oljuprísurin lækkaður, so møguleiki er fyri enn lægri oljuútreiðslum. Nevndin metir, at úrslitið er nøktandi.

Annars verður víst til áður nevndu frágreiðing frá SEV nevnd "FÍGGJARGONGDIN 2014 og RAKSTRAR-, FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN 2015", sum neyvari lýsir viðurskiftini kring fíggjarætlanina.

Fíggjarætlan fyri 2015, sum var send út saman við fundarfráboðanini, lýsir búskapin hjá SEV við ætlaðum dótturfeløgum í Neshaga og í Húsahaga. Nevndin mælir til, at fíggjarætlanin fyri 2015 verður samtykt, uttan at lagt er upp fyri, at dótturfeløg verða stovnað, og verður henda broytta fíggjarætlanin løgd fram og gjøgnumgingin á fundinum í dag. Verður tað seinni samtykt at stovna dótturfeløg, verður uppskot til broytta fíggjarætlan at leggja fyri sama aðalfund, sum tekur støðu til stovnan av dótturfeløgum.

## Tekniski rakstur felagsins

Á Vágsverkinum hendi óhapp á M3 við koplingini millum motor og genarator. Koplingin er nú umvæld. Nýggjur fyribils eykamáttur er settur upp fyri at nøkta veitingina, meðan útbyggingin av Vágsverkinum fer fram.

Á Sundsverkinum er M3 skiftur út við tvær nýggjar 2,4 MW motoreindir. Motorarnir eru settir upp, og nú verður arbeitt vil tí eltøkniliga partinum. Væntandi eru motorarnir liðugt íbundnir fyrst í næsta ár. Fyrr í heyst var óhapp við roykgassketlinum á M4, sum verður skiftur út í 2015. Arbeitt verður við at innføra elektroniska viðlíkahaldsskipan á øllum motorriknum verkum.

Í løtuni verður Fossáverkið innrættað av nýggjum. Eltøknin á verkinum er somuleiðis dagførd. Í sambandi við hesar umvælingar var kontrollrúmið flutt til Eiðisverkið. Nú arbeiðið á Fossáverkinum skjótt verður liðugt, verður kontrollrúmið flutt aftur til Fossáverkið.

Vatnveitingarrørið millum Svartadal og Strandadal er nú liðugt umvælt og tikið í nýtslu. Viðlíkahaldsskipan er gjørd fyri veitir og vatninntøk á vatnorkuverkunum.

Økta vindorkuframleiðslan frá vindmyllulundini í Húsahaga krevur, at framleiðsluleisturin verður endurskoðaður soleiðis, at sum mest av varandi orku fæst til vega. Hetta hendir í løtuni, og her skal eisini leggjast upp fyri, at battarískipanin verður virkin miðskeiðis í 2015.

SEV hevur gjørt avtalu við Enercon um viðlíkahald, hetta krevur eisini, at felagið skipar seg við skikkaðari manning til uppgávuna. Søkt verður í næstum eftir fólki til hetta.

Í Suðuroy er seinasti parturin av lágspenninginum kaðallagdur. Eisini er umlegging og ábøtur gjørdar á háspenninginum í Vági íroknað ein sjókaðal um Vágsfjørð.

Nýtt kaðalsamband er lagt í Skopun millum bygdina og verkið. Eisini eru strekkini Sørvágur-Bøur og Vatnsoyrar-Oyragjógv kaðalløgd. Strekkið Haraldsund-Kunoy er kaðallagt gjøgnum tunnilin, og partur av linjunum í Kalsoynni eru eisini lagdur í jørð. Arbeiðið í Kalsoynni verður væntandi liðugt komandi ár. Luftlinjan til Gjáar er løgd í jørð.

Umlegging er gjørd á háspenningsveitingini í Fuglafirði, og transformarastøð er gjørd á virkinum hjá Pelagos.

Í Suðurstreymoy er kaðallagt millum Sundsverkið og Tórshavn, og háspenningur er somuleiðis lagdur millum Sundsverkið og vindmyllulundina í Húsahaga.

Arbeitt verður við ætlaðum viðlíkahaldi av 60 kV kervinum, har rusttærdar mastrar verða skiftar út.

Nýggj skrivstovuhøli eru innrættað í verkstaðarbygninginum á Oyrunum í Vági. Ætlandi flytir skrivstovan sítt virksemi í desember mánað.

Umleggingin av øllum málarum hjá brúkarunum til fjaravlestur heldur fram. Ætlanin er, at umleggingin skal verða liðug við árslok 2015.

## Grønt fyri framman

Tað er hugaligt at taka saman um og kunna staðfesta, at vit av álvara hava lagt okkum á grønu kósina. Tað er grønt fyri framman, og dagsskráin er fjølbroytt.

Vaksandi eftirspurningurin eftir elorku kann í roynd og veru sigast at vera ein størri avbjóðing í dag enn nakrantíð áður, tí samstundis sum framtíðar eltørvurin økist við nógvari ferð, skulu vit halda grønu kósina og málið um 100 prosent grøna elorku í 2030.

SEV liggur í løtuni á einum alduryggi, og gongdin er góð. Men tað er eisini nú, meðan vit hava nógva orku, vit skulu seta røttu málini og brynja okkum til komandi samfelagsligar aldudalar, sum tá ið av tornar ikki gerast so djúpir, tí vit nevniliga megnaðu at seta framsøkin mál.

Framtíðin er í fyrstu atløgu grøn elorka við oljuni sum tiltakstrygd. Longri frammi er málið, at vit sleppa av við oljuna og veita 100 prosent elorku burtur úr varandi orkukeldum. Streymveitingin og dagligi raksturin eru kortini okkara høvuðssetningur í gerandisdegnum, og við síðuna av hesum stóra arbeiðsetningi liggja t.d. viðlíkahald, útbyggingar, gransking og samstarv bæði í Føroyum og uttanlands. SEV skapar arbeiðspláss í Føroyum og dregur nýggja vitan hendanvegin við fjøl-broyttum samstarvi við áhugaverdar framleiðarar innan elorku uttanlands.

Tað er avbjóðandi og spennandi at royna at hyggja inn í framtíðina. Okkara góðu starvsfólk bera elfelagið fram á leið, og við virðisorðunum “Samstarv, Eldhugi og Virðing” halda vit grønu kósina. Vit bakka ikki fyri avbjóðingum, men taka heldur við teimum, eins og forfedrarnir gjørdu, tá ið teir stovnaðu hetta felag 1. oktober 1946.  SEV er fólksins ogn, samhaldsfesti og samstarv tykjast enn at vera vegurin fram.

Tórshavn, hin 28. november 2014

Nevndin í SEV